# SUÐURGARÐ

**Ráðgeving & Leiðslumenning**




Við tilstuðlan frá mongum bjóða vit nú saman við okkara danska og føroyska netverki opin hold í leiðaraútbúgvingunum:

**GLÚ, Grundleggjandi leiðaraútbúgving byrjar 4. mars 2009 á Hotel Føroyum**

Útbúgvingin er sera vælegnað til leiðarar, deildarleiðarar, fyristøðufólk, verkførarar og formenn. Her lærir tú millum annað hvat góð leiðsla er, at handfara ósemjur og trupulleikar, at blíva betur til at samskifta og at tilrættaleggja egna tíð.

**PLÚ, Grundleggjandi projektleiðara-útbúgving byrjar 19. mars 2009 á Hotel Føroyum**

Útbúgvingin er ætlað leiðarum frá bæði privat-um og almennum virkjum og lyklapersónum, sum arbeiða við verkætlanum. Tú lærir millum annað at gera eina verkætlan við virksemisyvirliti og hvussu tú skapar motivatión og áhuga, tá tú skalt byrja eina verkætlan, samanseta og menna ein projektbólk.

Les meir um útbúgvingarnar á **www.sudurgard.fo**

Tilmelding fer fram á sudurgard@sudurgard.fo

**Um ivamál eru ring til Pólinu Suðurgarð, tlf. 332028 ella 221684**

Sp/f Suðurgarð · Ovastuhjallar 11
FO-360 Sandavágur · Tel 33 20 28
Far 22 16 84 · sudurgard@sudurgard.fo
www.sudurgard.fo

**ókeypis.fo**

***...fá meira fyri einki!***

Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Brúkaraumboðið

**Søkt verður við hesum eftir stjóra til Brúkaraumboðið at seta skjótast gjørligt.**

**Starvsøkið**
Brúkaraumboðið er ein nýggjur landsstovnur, sum fer at umsita marknaðarføringslógina.

Hetta inniber at hava eftirlit við, at marknaðarføringslógin og reglur við heimild í lógini verða hildnar, umframt at skapa siðvenju fyri umsitingini av lógini.

Tú skalt í fyrstu syftu standa á odda fyri at byggja upp nýggja stovnin, herundir seta fólk, ið saman við tær skulu røkja uppgávur stovnsins. Samlaða játtanin til stovnin fyri 2009 er 1,2 mió. kr. Ætlanin er at leggja stovnin í Suðuroy.

**Starvið**
Sum leiðari á Brúkaraumboðnum hevur tú ábyrgdina av samspælinum millum stovnin og brúkarar og veitarar av vørum og tænastum, og við atliti at almennum samfelagsáhugamálum er tín uppgáva at virka fyri, at ein góður marknaðarføringssiður verður mentur á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum.

Til hesar uppgávur krevst, at tú ert diplomatisk/ur og dugir at taka støðu til ymisk sjónarmið, umframt at tú kanst taka greiðar avgerðir. Harafturat skalt tú megna at umsita marknaðarføringslógina soleiðis, at hon í minst møguligan mun tarnar tí skapandi virksemi, ið fer fram innan marknaðarføring.

Umframt at tryggja gott samskifti við brúkarar og veitarar, skalt tú arbeiða fyri, at ídni og eldhugi eru í hásæti á stovninum.

**Umsóknir**
Heldur tú, hetta vera eina spennandi avbjóðing at standa á odda fyri Brúkaraumboðnum, og kanst tú vísa á, at tú hevur:

- løgfrøðiliga kandidatútbúgving, ella aðra viðkomandi útbúgving á kandidatstøði,
- góðan førleika at samskifta munnliga og skrivliga og hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt,
- áhuga fyri teimum samskiftishættum, ið nýttir verða innan marknaðarføring,
- sýnd góð samstarvsevni,

biðja vit teg lata okkum tína umsókn við CV, prógvum o.ø., so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 9. mars 2009.

**Setanartreytir og annað**
Starvið verður sett fyri eitt 5-ára tíðarskeið. Starvið er lønt í 37. lønarflokki eftir sáttmálanum millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir annars eru eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Arna Poulsen, aðal stjóra, á telefon 35 60 70.

**Vinnumálaráðið**
**Tinganes**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

# Ársins vinnuliga tiltak í Gundadali 27. 29. mei



Tekning beinleiðis á www.fex.fo - T-post: xpro@xpro.fo - tel 30 80 30 - fax 30 80 31

**Fish Expo 2009**

**27. - 29. mei 2009, Tórshavn**
**tel 30 80 30 - fax 30 80 31**
**T-post: xpro@xpro.fo - www.fex.fo**